Kl. 11 Lesibólkurin: Vit lesa: ”Endurminningar” Heðin Brú. Hittast 26. nov. Vit halda til á bókasavninum. Øll áhugaði eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 14-15 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen.
Kl. 10-17 Jólasøla í kjallaranum.
**Fríggjadagur**
Kl. 9-17 Bindiklubbur
Kl. 10-13.30 Magerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491.
Kl. 10-17 Jólasøla í kjallaranum.
**Leygardagur**
Kl. 10-16 Jólatombola í kjallaranum.
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin. Opið hús. Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Kunningarstovan í Tórshavn**
Sunnudagin verður gongutúrur frá Hotel Føroyum og eftir ríðugøtuni og niðan á Vesturvarða. Farið verður frá Hotel Føroyum kl. 10. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við.
Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

**Sunda pensionistafelag**
Jólaveitslan verður í Bygdahúsinum í Hósvík 12. des. kl. 17. Seinasta freist at tekna seg er mánadagin 7. des. Á telefon 271073 ella 422152. Minnist til at hava jólapakka við. Bussur koyrir frá streyminum. Nevndin

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*
Mánadagin 23. nov.
Vit ringla um pakkar. Øll hava 2 pakkar við.
Mikudagin 25. nov.
Myndaveving við Súsonnu í Jákupsstovu.
Hósdagin 26. nov.
myndaveving við Súsonnu í Jákupsstovu.

**Pensionistafelagið í Havn**
Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst.
Telefon: 22 27 33
E-mail: finnurj@post.olivant.fo

**Eldrafelagið Nón**
Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit eru flutt, og møtast nú í Lonini, mánadag, týsdag (ítriv v/Rigmor), og mikudag, kl. 15-18. Eisini verður teldulæra. Ring til Jóhan Hera, tlf. 737810.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mána- týs- og hósdag frá kl. 13 til 17.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
Hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag til hósdag
kl. 13.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.***

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella kanska gjørt nakað, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndarlimunum.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015 - 110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og
Marin 314333 - 284333.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun!
Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf

## Brúdleyp

Leygardagin 21. nov. giftast Kristianna Eliasen, Leirvík, og Fríðrik Heinesen, Tórshavn. Vígslan verður í Ebenezer Tórshavn kl. 13. Drekka verður eftir vígsluna í Ebenezer, har øll eru vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.

Fríggjadagin 4. des. kl. 10 giftast í Sørvágs kirkju, Tórgun Jørleifsdøttur úr Sørvági og Hans Petur Lamhauge av Skála.
Dagurin verður hildin í missiónshúsinum Libanon í Sørvági frá 13-17 har øll eru hjartaliga vælkomin.



# HEILSANIR



Hjartaliga tøkk til øll tykkum, ið gleddu, mintust og hjálpti okkum í samband við hjúnabandsdegi okkara tann 16. mai 2009. Eisini eina stóra tøkk til øll tykkum, ið komu á gátt til brúðarhús okkara.
**Fríðunn og Jari Mellemgaard**



Sigmund og Ingrid Hentze vilja nýta høvi at takka øllum tykkum, sum á einhvønn hátt gleddu okkum á okkara gullbrúdleypsdegi tann 26. september.



**Góði Høgni**
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum 24. nov. Eisini ein heilsan til tín Asbjørg.
**Heilsan mamma og pápi**



**Góða Anna Stasi**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 23. nov. Eisini ein heilsan til tín góða Asbjørg.
**Heilsan omma og abbi**

Sosialurin *Heilsanir* kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:______________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:____________________
Bústaður:____________________
Bygd/býur:____________ Tlf.:________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<



**Allar besti babba**
Hjartaliga tillukku við degnum 24. nov.
Eg eri so góð við teg.
**Kærastu heilsanir Asbjørg**



**Góða fitta systkinabarn**
Eg eri so góð við teg. Tillukku til tín, tillukku til tín mín góða Annastasi.
**Kærastu heilsanir Asbjørg**